

Empire State Building



Gamalt og nýtt møtast í New York



AT&T Building

og vit fara inn og keypa billettir heilt uppá toppin.

At hetta er ein bygningur, sniðgivin í Art Deco stíli, sæst tíðiliga innan tá man trínir inn í henda flotta bygning og inn í eina forhøll fult designað í Art Deco – eitt satt meistaraverk í arkitektoniskum stráliglansi. Sum vit ganga nakað upp í bygningin, síggja




Forhøllin í Empire State

vit bordar á veggjum, loftsgesimsar, rekkverk í trappum, gólvmynstur og lampur – alt í hesum sama Art Deco stíli. Arkitektarnir vóru: Shreve, Lamb & Harmon.

Bygningurin var so nógv sum til bar, gjørdur úr præfabrikeraðum bygningslutum, sum komu aðrastaðis frá í landinum, har teir vóru framleiddir, og síðani sendir til byggiplássið við 5. Avenue í New York, har teir vóru settir upp á pláss í bygninginum.

Uttan eru tey lodrættu vindeygabondini, sum fáa bygningin at virka enn hægri, klødd og dekorerað við rustfríðum stáli í Art Deco.

Tað sum kundi undra, var, at bygningurin, sum stóð liðugur í 1931, er so vælhildin, og vit fingu skjótt ta fatan,



New York úr erva



Broadway úr erva

at newyorkarar vóru góðir við henda bygning, og hann verður ofta nevndur av guidum,sum taka sær av ferðandi, og á gøtunum eru skelti, sum vísa til hvar Empire State stendur.

Uppi á 86. hædd er uttandura útsýnispallur, sum er tjokkaður av fólki og her hoyrast øll tungumál, og entusiasman sæst í eygnabráðinum hjá vaksnum og smáum – kvinnum og monnum.

Útsýni her er tað besta í New York, og tú sært allan býin og út har býurin endar, og eingjagarðarnir taka við, og allar brúgvarnar, havninar og áirnar, og heilt til havs.

Sum tú stendur heruppi, sæðst hvussu tættur býurin er, og hvussu nógvir høgir bygningar standa lið við lið í beinum rekkjum, eins og í ymsum vinklum hvør at øðrum. Her frá síggjast ongi grøn øki burtursæð frá Central Park og onkur hissini grønur blettur og man undrast yvir, at menniskjan kann búgva í einum sovorðnum hurlivasa og fjøld av høgum húsum og skýskravarum.

Apropos skýskravarum, hoyr her, hvat kendi amerikanski arkitekturin, Philip Johnson, sum hevur teknað fleiri skýskravarar og m.a. er kendur fyri at tekna tann kontroversiella bygningin til AT&T Headquarter, hugleiðir um skýskravarar:

***Philip Johnson:***
*»Eg haldi, tann áhugaverdi spurningurin er, hví menniskjan ynskir at byggja upp til himmals...«*
*»Skýskravarin bleiv ein partur av tí kommersiella heiminum, tí vit høvdu onga religión sum vit kundu úttrykkja...«*
*»Fólk hava ymsar meiningar um, hvussu skýskravarin bleiv til, men í øllum mentanum er tað í grundini bert ein orsøk, og hon er, at mann byggir høgt grundað á religiøsa trúgv ella fyri at vísa seg...«*
*»Hetta ynski um at byggja høgt tykist sum ein náttúrlig trongd, akkurát sum sex og slagsmál...«*
*»Hugsa bert um søguna um Babelstornið. Hon snýr seg um vald – vald og dominans...«*

Og hetta verður sagt í einum amerikonskum arkitektatíðarriti um tann postmodernistiska bygningin, sum Philip Johnson teknaði til AT&T:

*»Við AT&T bygninginum risti tann stílmedvitandi Philip Johnson – býarmenniskja, stuttligur og vandin – upp í byggisiðin, sum gjøgnum trý ártíggir var sovnaður dovisliga í banalum glas- og stáltolkingum av modernismuni av so at siga øllum arkitektum, sum tá teknaðu høvuðssæti til vinnuvirkir.«*